Álit

í

løgtingsmáli nr. 30/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í 2018, 2019 og 2020 og botnfiski í Barentshavinum í 2020 (Leingjan av heimild at taka veiðigjald)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 30. september 2020 og eftir 1. viðgerð 8. oktober 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 1., 3. og 7. desember 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Føroya Fiskimannafelag, Maskinmeistarafelagið, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Reiðarafelag, Búskaparráðið, landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum við einum broytingaruppskoti.

Nevndin hevur ymiskar viðmerkingar.

Magnus Rasmussen, Jákup Mikkelsen, Bill Justinussen og Kristin Michelsen hava hesar viðmerkingar:

Lógaruppskotið er ein leingjan av heimild at taka veiðigjald. Galdandi lóg ásetir veiðigjøld fyri 2018, 2019 og 2020 fyri makrel, svartkjaft, norðhavssild og botnfisk í Barentshavinum, og við hesum lógaruppskotinum verður heimildin longd við einum ári, til 31. desember 2021.
Hesum verður tikið undir við.

Aksel V. Johannesen, Kristina Háfoss og Ruth Vang hava hesar viðmerkingar:

Vit mæla frá – vegna Tjóðveldi, Framsókn og Javnaðarflokkin – at veiðigjøld verða ásett eftir, hvat landsstýrið og samgongan ynskja av inntøku á fíggjarlógini. Hetta er ein grundleggjandi skeivur máti at áseta veiðigjøld.

Veiðigjøldini eiga hinvegin at verða ásett soleiðis, at rindað verður í mun til, hvussu stór sokallaða "tilfeingisrentan" er av virkseminum. Hvussu stór henda er, er m.a. tengt at, hvussu gongdin er á marknaðinum, og hvussu stórt avreiðingarvirðið er. Tað ber væl til at gera hetta á ein einfaldan og gjøgnumskygdan hátt.

Hetta lógaruppskotið frá landsstýrinum, ið ásetir fasta krónu-upphædd fyri hvørt kilo, tekur ikki hædd fyri, at marknaðartreytirnar broytast, og at avreiðingarvirðið broytist. Tí eru nøkur av ásettu

gjøldunum, t.d. á makreli, nú vorðin munandi størri prosentpartur av avreiðingarvirðinum orsakað av lækkandi prísum. Hetta hevur stóra ávirkan á úrslitið hjá fiskivinnuni.

Samstundis hevur landsstýrið framt broytingar í fjør, ið hava lækkað inntøkur landsins munandi, uttan at seta nýggjar inntøkur í staðin. Hetta hevur verið við til at venda avlopi til hall, og at undirgrava langtíðar fíggjarliga haldførið hjá landskassanum.

Vit mæla til, at samgongan, saman við okkara flokkum, arbeiðir víðari við eini loysn, soleiðis at vit fáa eina breiða semju og varandi loysn fyri framtíðar veiðigjøld í fiskivinnuni.

Áhaldandi ásetingar av fyribilsgjøldum í fiskivinnuni eru alt annað enn tryggir karmar fyri fiskivinnuna.

Undir viðgerð av málinum í Fíggjarnevndini er komið fram, at arbeiðsbólkur arbeiðir við uppskoti til nýtt tilfeingisgjald, og at hetta uppskot síðan fer til politiska viðgerð.

Vit mæla landsstýrinum staðiliga til, at andstøðan verður tikin við í arbeiðið at gera lóg fyri eitt nýtt tilfeingisgjald. Hetta er fyritreyt fyri, at talan kann vera um eitt varandi tilfeingisgjald, og ein fyritreyt fyri at skapa meira tryggar karmar fyri okkara fiskivinnu.

Um henda lóg ikki verður samtykt, verða als ongi tilfeingisgjøld fyri árið 2021.

Tí fara vit - hóast vit eru ímóti mátanum, ið hetta verður gjørt - at taka undir við málinum sum enn eina fyribils loysn.

Ein samd nevnd hevur harumframt hesa viðmerking:

Nevndin heldur, at uppskotna heitið á løgtingslógini eigur at vera tillagað fyri at samsvara við innihaldið, og setir hon tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
   “Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

“Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018, 2019, 2020 og 2021 og botnfiski í Barentshavinum í 2020 og 2021””

Viðmerkingar

Heitið á løgtingslógini verður tillagað samsvarandi innihaldinum, og tilskilað verður, at veiðigjaldið fyri botnfisk snýr seg um botnfisk, fiskaður í Barentshavinum.

Við hesum viðmerkingum og broyting tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 10. desember 2020

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Kristina Háfoss
	Ruth Vang	